


Jólatræið

Várt jólatræ skal minna teg á,
at Jesusbarnið í krubbu lá,
at Jesus nevndi seg sjálvan
eitt træ og vit eru greinarnar,
minnist til tað!



Træið

Granntræið, so vakurt og hátt,
minni um vøkstur og lívið gott,
minnir á træið í paradís,
har vit skulu bera Harranum prís.



Stjørnan

Hygg, Betlehemsstjørnan
sendir sítt ljós, so menn finna
vegin yvir í fjós.
Tríggir vísmenn vóru fyrstir
á veg; men nú kunnu vit fara,
bæði tú og eg.



Eingilin

Hirðarnir vaknaðu úti á ong,
tí teir hoyrdu fagran einglasong.
Einglarnir boðaðu gleði og gleim:
Frelsarin Jesus er borin í heim.




Klokkur

Klokkurnar ringja hátíðina inn,
minna um orðið í hjarta og sinn.
Bjøllurnar smáu á trænum skína
minna um høgtíð og barnatíð tína.



Ljós

Ljósið er Jesus, og hann víst býr í hvørjum hjarta, sum hesum nú trýr.
Halt ljósið høgt, so at øll tað skilja: Jesus gevur lív eftir Guds vilja.



Glitur

Sum ljósið skyggir í glitrinum balda, skulu vit vera ljós her í heiminum kalda.
Verja um alt tað, sum veksur og grør, vera Guds hendur og føtur á jørð.



Fuglar

Fuglarnir, teir sita trøunum á,
veikir teir eru, eg verja teir má.
Heilagi andi sum dúgva kom niður, hetta Guds orð okkum klárliga sigur.



Kavi

Sum kavin fellur, alt skittið hann goymir, so veit eg Gud mínar syndir gloymir.
Nýlagstur kavi, hitt reinasta reina, minnir um Jesus og Jesus aleina.



Kavi

Hvíti kavin, hitt reinasta reina, vísir á Jesus, ja, Jesus aleina, sum synd vára bøtti við einum prísi, ið læt upp vegin til paradísið.